## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur upp í skrið av suðri og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og møguliga regn eitt skifti. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

– – –

November var vátur og ógviliga lýggjur. Avfallið var 176 mm móti 148,5 mm. Miðalhitin var 7,1° móti 4,9°

# Kanal Null




Hækkingin av SvF-gjaldinum skal forða fyri at fólk hava ráð at síggja annað enn SvF

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | – |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷7 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | ÷2 |
| Kiev | ÷3 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 18 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | – |
| New York | ÷3 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 952 hPa sunnan fyri Hvarvið fer móti Grønlandsfjørðinum og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum grynnist og brúgvalagið við Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/12 kl. 06⁰⁰– 05/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 04/12 kl. 06⁰⁰– 05/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 19,5 mm

# Jólakonsert í Vesturkirkjuni

**G.H.M., Harmoniorkestur, Havnakórið og Havnar Hornorkestur framføra tónlek á jólakonsertini í Vesturkirkjuni sunnukvøldið 8. desember kl. 20**

JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*

Sunnukvøldið 8. desember kl 20.00 verður Vesturkirkjan karmur um jólakonsertina, sum er á hvørjum ári undan jólum.

Havnakórið, undir leiðslu av Ólavi Hátún, fer at framføra seks jólakórsatsir eftir Carl Clausen. Føstu gestirnir á jólakonsertum í Vesturkirkjuni, Havnar Hornorkestur, undir leiðslu av Ova Olsen, og G.H.M. Harmoniorkestur, undir leiðslu av Andreu Heindriksdóttir, verða eisini við í ár. G.H.M. fer m.a. at framføra the Holy City saman við Fróða Sandoy, sum syngur. Harumframt er ein konsert eftir Vivaldi útsett fyri trompet og orkestur.

Úr skránni hjá Hornorkestrinum kann m.a. nevnast:

Eg eri jólamaðurin, eftir H. J. Højgaard og jólavøgguvísa. Eisini verður soloframførsla við Jógvan Thomsen, sum fer at framføra brot úr sonatu eftir Mendelssohn Bartholdy á orglinum í kirkjuni.

# Jólahald fyri eldri í Klaksvík

JÓLAHALD
*Tíðindaskriv*

Leygardagin kl. 15 verður jólahugni í Christianskirkjuni í Klaksvík fyri teimum eldru.

Øll eru vælkomin, og vantar nøkrum flutning, kunnu tey venda sær til annan av prestunum ella til limirnar í kirkjuráðnum.

## VESTFALLSKYRRINDI

2. des.: Mánin næstur jørðini
4. des.: Tendring
11. des.: Fyrra kvarter
14. des.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmannasundi | | Mykinesfirði | | Nólsoyarfirði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvannasundi | | Fugloyarfirði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 6. des. | 08.01 | 20.31 | 07.01 | 19.31 | 07.16 | 19.46 | 10.01 | 22.31 | 11.01 | 23.31 | 06.16 | 18.46 | 05.16 | 17.46 | 08.16 | 20.46 | 09.16 | 21.46 | 07.46 | 20.16 | 09.01 | 21.31 |
| 7. des. | 08.59 | 21.27 | 07.59 | 20.27 | 08.14 | 20.42 | 10.59 | 23.27 | 11.59 | — | 07.14 | 19.42 | 06.14 | 18.42 | 09.14 | 21.42 | 10.14 | 22.42 | 08.44 | 21.12 | 09.59 | 22.27 |
| 8. des. | 09.52 | 22.19 | 08.52 | 21.19 | 09.07 | 21.34 | 11.52 | — | 00.27 | 12.52 | 08.07 | 20.34 | 07.07 | 19.34 | 10.07 | 22.34 | 11.07 | 23.34 | 09.37 | 22.04 | 10.52 | 23.19 |
| 9. des. | 10.42 | 23.06 | 09.42 | 22.06 | 09.57 | 22.21 | 00.19 | 12.42 | 01.19 | 13.42 | 08.57 | 21.21 | 07.57 | 20.21 | 10.57 | 23.21 | 11.57 | — | 10.27 | 22.51 | 11.42 | — |